# Herbergið er fult

**Í nærum fýra ár hevur Frelsunarherurin í Havn havt eitt herberg fyri heimleys. Niels Edvard Olsen, ið stendur fyri herberginum, sigur, at tey hava havt einar 2000 yvirnáttingar bara í ár, og tað er fullsett hvørja nátt**

HEIMLEYS

*Stefan í Skorini*



*Hetta lítla skjólið hevur ein heimleysur bygt sær. Her kann vera gott at kroka í, tá illveðrið leikar á og ikki slepst inn á herbergið hjá Frelsunerherinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað eru fleiri heimleys í Havnini. Tey flestu hava rúsdrekka ella rúsevnis-trupulleikar, og tey hava ongastaðni at búgva.

Tí stovnaði Frelsunarherurin eitt herberg á vári í 1998, og tað hevur víst seg, at stórur tørvur er á einum slíkum herbergi, tí tey heimleysu hava ongastaðni at fara.

Herbergið letur upp klokkan tíggju á kvøldið og steingir aftur klokkan tíggju á morgni. Her fáa gestirnir fjálgar sengur at liggja í og um dagin er møguleiki hjá teimum at fáa okkurt til matna.

Tríggjar tímar seinnapartin er opið aftur, og tá fáa tey heimleysu eina máltíð frá Frelsunarherinum.

Tó eru fýra tímar fyrrapart og fimm tímar seinnapart, har tey heimleysu ongastaðni hava at vera. Tá halda tey til hjá onkrum vinum, ella reika tey runt í gøtunum og royna at finna sær skjól.

Onkuntíð byggja tey heimleysu sær lítil skjól av burturkasti og plattum, ið rekast uttanfyri handlar og fyritøkur. Eitt slíkt skjól er í Magnus Heinasonargøtu, aftanfyri bakaríið hjá Frants og við síðuna av sjúkrakassanum. Her plaga tey heimleysu mangan at halda til, og tí byggja tey sær skjól og kroka, tá tað er kalt og ótespiligt veður.

Onkur hevur meldað hetta skjólið til løgregluna, tí tey vilja hava tað burtur hiðani.

## Mest menn

Flestu gestirnir í herberginum eru menn. Tó hendir tað av og á, at kvinnur eisini finna leiðina inn í herbergið.

Niels Edvard sigur, at talið av kvinnum ikki hevur verið eins stórt í ár sum undanfarin ár.

Á herberginum eru seks sengur, og í miðal er fult hvørja ferð. Tað vil siga, at onkuntíð eru fleiri enn seks fólk og onkuntíð færri.

Tá fleiri gestir hava tørv á song, verður reitt upp á madrassum á gólvinum, so pláss er fyri fleiri. Eitt lítið rúm við einari song er til konufólk, so øll ikki sova í sama rúmi. Har er eisini pláss fyri eini madrassu á gólvinum.

Niels Edvard leggur afturat, at tað eru mest tey somu fólkini, ið búgva har dag um dag. Tey hava ongastaðni at vera og halda seg tí til herbergið.

– Fleiri av teimum heimleysu hava sovið her, síðani vit lótu upp fyri fýra árum síðani, sigur Niels Edvard Olsen, sum saman við tveimum øðrum starvsfólkum arbeiðir á herberginum.

Seinastu tíðina hevur herbergið fingið stuðul frá bæði landi og kommunu. Hetta er tó bara til lønir til starvsfólkið, og stuðulin røkkur ikki heilt til hetta. So skal eisini gjaldast fyri mat og annað.

Frelsunarherurin má tí hava stuðul frá privatum fólki, og grundarlagið undir virkseminum umframt almennan stuðul er innsavningin í jólabússunum, ið standa í handlum kring landið. Tí vónar hann, at fólk fara at taka væl undir við hesi innsavning.









Norðurfisk í Árnafirði:

# Tað lítla flakavirkið, sum ongantíð fór á heysin

*Á Norðurfisk í Árnafirði arbeiða 15-20 fólk eini 800-1000 tons av ráfiski um árið*



**Norðurfisk er eitt av teimum smáu og gomlu virkjunum í Føroyum. Í sínari tíð var fiskakøka og raspaði hýsufløk nøkur av vørumerkjunum, ið virkið varð kent fyri. Henda framleiðsla varð seld á føroyska marknaðinum. Í dag er Norðurfisk eitt lítið, men vanligt flakavirki, sum virkar og selir fryst fløk av landinum**

*Vilmund Jacobsen*

Fyrst í nítiárunum fóru nógv skip og virkir á húsagang, men eitt av teimum fáu, sum altíð hevur hórað undan, er lítla flakavirkið í Árnafirði, Sp/f Norðurfisk, sum heldur ikki er nakar ársungi innan fiskaframleiðslu í Føroyum.

Tað er John Høj, konan og sonurin, sum eiga virkið, og tað hava tey gjørt í mong Harrans ár. Virkisleiðari er árnfirðingurin, Theodor Askham Olsen.

Í sínari tíð var virkið kent fyri sína fiskakøku og hýsufløk í raspi, sum seld vórðu á føroyska marknaðinum. Fiskakøkan er ikki til longur, men enn framleiðir Norðurfisk raspaði hýsufløk um ikki í so stórum nøgdum sum áður.

## Vanligt flakavirki

- Í dag er Norðurfisk eitt lítið, men vanligt flakavirki, sum byggir sína framleiðslu á fryst toska-og hýsufløk. Vit plaga eisini at keypa hvíting, tá ið tann tíðin er. Upsa gera vit lítið og einki við. Okkara høvuðsmarknaður er Frakland og Ongland, men nakað fer eisini til USA.

Theodor Askham Olsen sigur, at Norðurfisk serliga hevur "spesialiserað" seg í smáum toski og hýsu, og hann heldur ikki, at tað hevur verið so torført at fingið fatur á fiski. Keypt verður á uppboðssølu, bæði í Klaksvík, Toftum, Sørvági og í Vági. Virkið plagar eisini at liggja inni við frystum russarafiski, sum tey hava at taka til, tá ið minni er av øðrum.

- Keyparin veit, at vit virka burtur úr smáum toski og hýsu. Hesin fiskurin er bíligari at keypa, men minni fæst eisini fyri hann á marknaðinum. Tann stóri toskurin verður ofta saltaður, og tá er hann dýrari, enn tá ið hann fer sum fryst flak, sigur virkisleiðarin.

## 15-20 fólk

Á Norðurfisk arbeiða eini 15-20 fólk. Hesi eru úr Árnafirði og grannabygdunum, Klaksvík og Viðareiði. Nakrir skúlanæmingar plaga eisini at tjena sær nakrar krónur á virkinum.

- Vit arbeiða næstan hvønn dag; her eru fáir frídagar, men tað kemur fyri, at okkum vantar fólk, og tá er gott at hava nakrar skúlanæmingar, sum kunnu taka eina hond í á virkinum.

Higartil í ár hevur Norðurfisk keypt 700-800 tonsum av ráfiski, og er hetta eitt vanligt ár í nøgd. Okkurt árið hevur virkið tikið eini 1000 tons.

Sosialurin

